# Makkara kapping

Í 2021 verður gjørd roynd, at skipa fyri nýggjari makkara kapping.

## Paring

Tveir skjúttar mynda makkara parið. Parið verður funnin, við at para besta og ringasta skjútta, næst besta og næst ringasta, o.s.fr.

Paringin verður gjørd útfrá trimum teimum fyrstu innleiðandi umførunum.

Er javnt í millum skjúttar, verður hugt eftir 3. umfar, er framvegis javnt verður hugt eftir 2. umfar. Er framvegis javnt, verður lutakast millum skjúttar sum eru javnir.

Fyri at skjútti kann verða við í makkara kappingini, skal hann verða skrásettur limur í føroyskum limafelag undir SkF, hava síni limaviðurskifti í ordan, og venja regluliga í Føroyum

## Úrslit

Parúrslitið verður funnið, við at telja saman tølini, frá trimum teimum fyrstu umførunum (fyrstu 75 dúgvurnar), hjá skjúttunum sum eru í parinum. Parið ið hevur hægsta talið, tá talt er saman, vinnur kappingina.

Er ólíka tal av skjúttum til kappingina, verður einsamalli skjúttin sum leypur av (í miðjuni) einsamallur, og hansara tal verður falda við 2, sum verður hansara parúrslit.

Eru fleiri pør jøvn í stigum á fyrsta plássið, fáa tey deilt fyrsta pláss.

## Kappingar

Allar almennar skeet og trap kappingar í Føroyum, sum standa í kappingarkalendaranum hjá SkF fyri 2021, telja við í makkara kappingini.

## Vinningar

Hvør skjútti í vinnandi parinum fær 100 kr. í part. Vinnur einsamallur skjútti, fær hann 200 kr.

Tá kappingarárið er liðugt, verða vinningarnir taldir saman, og samlaði vinningurin skal nýtast skjótingini at frama t.d. skjótivenjingar, skjótiskeið, kappingar, skjótiútgerð o.s.fr.
SkF skal góðkenna hvat vinningurin skal nýtast til.

Vinningar skulu nýtast innan kalendaraárið eftir t.v.s. des. 2022.

## Samtykki

1. Reglur samtyktar á nevndarfundir í SkF, í Vestmanna tann 4. nov. 2020.